# Almannastovan

## Skrivstovufulltrúi á Almannastovuni

Hevur tú hug at royna tíni evni í einari organisatión í støðugari menning? So er hetta kanska nakað fyri teg. Eitt fulltíðarstarv sum skrivstovufulltrúi við tænastu á Veitingardeildini á Almannastovni er leyst at seta pr. 16. apríl 2005.

**Um deildina:**
Á Veitingardeildini í Tórshavn arbeiða í løtuni 11 starvsfólk. Økið hjá deildini eru allar lógarbundnar veitingar. Tær eru pensjón, stuðul til uppihaldspening, dag- og barnapening.

**Arbeiðs- og ábyrdarøki:**
- Pensjónsmál - eftirlit og ávísing
- Dag- og barnapengamál - eftirlit og ávísing
- Uppihaldspeningur - eftirlit og ávísing
- Eftirlit við langtíðar veitingum frá almannamiðstøðunum
- Ráð og vegleiðing til málsviðgerar á deildini
- Upplæring av nýggjum starvsfólkum
- Lóggáva - at menna EDV-kervið til nýggja lóggávu
- Hagtøl
- Samskifta við aðrar partar av Almannastovuni
- Aðrar uppgávur

**Útbúgving:**
Skrivstovuútbúgving, merkonom ella onnur viðkomandi útbúgving.

**Førleikakrøv:**
Góðan kunnleika til KT og Office forritini
Gáðan málburð bæði munnliga og skrivliga
Góð samstarvsevni
Sjálvstøðug/-ur
Evni og vilja til at arbeiða í heildarloysnum og tvørfakligt
Dámar væl avbjóðingar og er ágrýtin

**Lønar- og setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Byrjunarlønin er í lønarbólki 4.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Tummas Djurhuus, deildarleiðara á Veitingardeildini tlf. 353510.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, Smyrilsvegur 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn í hendi **innan 31. mars 2005 kl. 12:00.**

**Um Almannastovuna**

*Fyri at betra um tænastustøði hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar.*
*Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.*
*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjón- dagpeningaog forsorgarøkinum v.m.*
*Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk.*
*Almannastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landsdekkandi serdeildir.*

FØROYA LANDSSTÝRI

# MENTAMÁLARÁÐIÐ

## Stuðul til mentanarlig tiltøk

Á fíggjarløgtingslógini 2005 er peningur settur av til stuðul til ymisk mentanarlig og listarlig tiltøk og verkætlanir innan- sum uttanlands.

Játtanin er ætlað at birta upp undir og stuðla einum virknum og mennandi mentanarlívi á bygd og í býi, at flyta fram og gera føroyska mentan og list sjónligari innan- og uttanlands, og at geva stuðul til føroyskar verkætlanir, ið lutvíst verða fíggjaðar við stuðli frá Norðurlendska Ráðharrastovninum, Norðurlendska Mentanargrunninum ella stovnum og nevndum undir Norðurlendska Ráðharrastovninum. Stuðul kann eisini veitast einstaklingum til nýskapandi listarlig ella mentanarlig tiltøk, verkætlanarfyrireiking og annað listarligt virksemi.

Áhugað eru vælkomin at søkja. Umsóknarblað eigur at nýtast.

**Freistin at søkja er týsdagin 15. mars 2005**

## Stuðul til barna- og ungdómsarbeiði

Tann upphædd, ið Mentamálaráðið umvegis Sp/f Íróttarvedding fær burturav veddingarpeninginum, verður nýttur sum stuðul til tiltøk og verkætlanir til gagns fyri børn og ung.

Tey, ið skipa fyri tiltøkum og standa fyri verkætlanum, sum eru børnum ella ungum til gagns, eru vælkomin at søkja. Umsóknarblað eigur at nýtast.

**Freistin at søkja er fríggjadagin 15. apríl 2005**

## Stuðul til myndlistafólk

Peningur er settur av á fíggjarløgtingslógini 2005 til stuðul fyri myndlistafólk. Listafólk sum eru undir útbúgving kunnu søkja. Yrkislistafólk kunnu søkja um stuðul til eftirútbúgving og til námsferðir. Umsóknarblað eigur at nýtast.

**Freistin at søkja er týsdagin 15. mars 2005**

**Umsóknarblað:**
Allar umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á internetinum á: www.mmr.fo, ella fáast við at venda sær til:

**Mentamálaráðið**
**Postrúm 3279 - 110 Tórshavn**
**Telefon 35 50 50 – Telefax 35 50 55**
**e-postur.: mmr@mmr.fo**

Tey, ið ynskja at vita meira um stuðulin, eru vælkomin at venda sær til Mentamálaráðið á telefon 355050.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Miðstovnurin í Gundadali**

Á stovninum ganga 40 børn millum 5 og 11 ár Seks starvsfólk starvast á stovninum.

## Barnaansingin í Tórshavnar Kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Miðstovnin í Gundadali:**
- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. apríl 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Vit bjóða**
Eitt spennandi starv, har viðkomandi kemur at arbeiða við børnum millum 5 og 11 ár. Aktiviteturin á stovninum er skipaður tværtur um aldursbýti.

**Vit vænta at tú**
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrinum og starvsfeløgunum
- kann virka í góðum samstarvið við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Astu Hjelm, leiðara, tlf. 223776.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Miðstovninum í Gundadali, Gundadalsvegur 6, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. mars 2005.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

## Tvingsilssøla

Tvingsilssøla verður av sethúsaognini matr. nr. 218a, Hvalba, fríggjadagin tann 8. apríl 2005 kl. 10.00 í Føroya Fútarætti, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn.

Sethúsini eru 48 m² til víddar.

Húsini standa á festijørð, sum skal frábýtast og keypast sambært tilsøgn frá Føroya Jarðarráði.

Frábýtta grundøkið verður mett at vera umleið 150 m² til víddar og kann yvirtakast fyri 8.000,00 kr. umframt frábýtingarútreiðslur, ómaksløn og tinglýsingargjald.

Ognin verður seld upp á vanligar tvingsilssølutreytir.

Heygum & Petersen